## Viðmerkingar:

# Føroyskt mál í Danmørk

***— ein gestur, sum er settur uttarliga! Svar til Róland Waag Høgnesen***



Í einum greinastubba um málstríðið, sum nú tók seg upp, setir Róland Waag Høgnesen mær hendan spurning: Er føroyskt mál í Danmark ikki minnilutamál, sum tú eigur at verja við sáttmálanum?

Svarið er jú. Eg síggi føroyskt mál sum mítt málsøki — og tað uttan mun til, um tað verður talað í Føroyum ella aðrastaðni.

Ein føroyingur uttanlands er líka nógv ein partur av føroysku tjóðini sum ein føroyingur, ið býr í Føroyum. Og at føroyingar uttanlands tala føroyskt er minst líka týdningarmikið fyri varðveitsluna av okkara størsta mentunararvi sum tað, at føroyskt verður talað í Føroyum.

Tí er tað av størsta týdningi, at vit royna at tryggja føroyskum góð kor uttanlands.

### Føroyskt eingi rættindi

Tann altjóða sáttmáli um mál, sum Danmark herfyri setti í verk ímóti okkara vilja, ásetir, at stjórnin sjálv kann velja at lýsa málini á sínum landøki sum antin minnilutamál, landspartamál ella almenn mál.

Tá sáttmálin varð settur í gildi, kundi danska stjórnin velja at lýsa føroyskt sum alment mál í Føroyum. Tað vildi hon sum kunnugt ikki. Tí hevur føroyskt í dag støðu sum landspartamál í Føroyum. Her eru 45.000 danir, ið tosa føroyskt. Og danska stjórnin helt hesar danir hava so nógv málslig rættindi frammanundan, at her var ikki tørvur á fleiri tiltøkum.

At føroyingar kravdu at fáa sítt mál staðfest sum alment mál og tjóðarmál, helt stjórnin sum kunnugt vera láturligt. Føroyska tjóðin er jú ikki til í altjóða rætti. Hvussu kann nakað tjóðarmál vera, har eingin tjóð er?

Viðvíkjandi føroyskum í Danmark, so kundi stjórnin velja at lýsa hetta sum eitt minnilutamál, og soleiðis tryggja tí góð rættindi í Danmark. Tað vildi hon heldur ikki. Føroyskt mál í Danmark — sum eftir mínum tykki er eitt ”minnilutamál” — er als ikki vart av sáttmálanum.

Tað var bara týskum í suður-slesvík, stjórnin valdi at geva støðu sum minnilutamál, og harvið tey rættindi, sum fylgja við tí.

### Havi reist málið

Tá Føroyar gerast sjálvstøðugar, verða vit til sum tjóð í altjóða høpi. Tá nýtist okkum ikki at dúva uppá, at danir hjálpa okkum. Tá fáa vit sjálvi amboðini í hondini. Tá kunnu vit sjálvi tryggja føroyskum støðu sum tjóðarmál. Og tá skulu vit, eftir mínum tykki, gerast sjálvstøðugur partur av hesum sáttmálanum.

Tá verður danskt minnilutamál í Føroyum, og tess rættindini skulu eftir mínum tykki tryggjast við sáttmálanum.

Á sama hátt skulu vit við sáttmálanum tryggja rættindini hjá føroyskum í Danmark.

Men hóast føroyingar sum er ikki hava myndugleika at gera stórvegis við hetta, so eiga vit kortini at gera tað, vit kunnu.

Eftir at danska stjórnin hevði skúgvað bæði løgting og landsstýrið til viks, og noktað at lýst føroyskt sum tjóðarmál, sendi eg tí danska mentamálaráðharranum eitt drúgt bræv, har eg m.a. setti henni hesar spurningar:

- Hvat hevur tú gjørt fyri at virka fyri, at eitt av teimum málum, tú sum danskur mentamálaráðharri umboðar — føroyskt — fær eina góða rættarstøðu?
- Hvat ætlar tú at gera fyri at tryggja føroyskum eina góða rættarstøðu?
- Í hvønn mun sært tú tað sum tína uppgávu at tryggja føroyskum máli eina rættarstøðu, sum er í samsvari við tann mentanarliga veruleikan?
- Danir í Føroyum hava ógvuliga víðfevnd málslig rættindi — og soleiðis vilja vit, at tað eisini skal vera framyvir. Hvat ætlar tú at gera fyri at tryggja føroyingum í Danmark málslig rættindi?

Eg sendi henni brævið hin 1. september, men havi framvegis ikki fingið svar.

Meira havi eg ikki gjørt higartil, Róland. Men so skjótt svar kemur, skalt tú frætta meira um, hvat hendir í málinum.

**Vinarliga**
**Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður**

# Til Oddvør Johansen rithøvund

Eg taki sum givið, at Oddvør Johansen dugir at lesa ein einfaldan tekst, so tá hon álíkavæl lesur burtur úr mínum greinastubba 13/9 í Sosialinum, at føroyingar fáa gratis læknahjálp í Danmark, so sigur hon ósatt við beráddum huga í Dimmalætting og Sosialinum 15/9. Tað er ódámligt. Og tá ið hon lýgur um onnur, samstundis sum hon fýlist á teirra vápn, sigur hetta mær, at hon er blottað fyri sjálvkritikk. Jú, sanniliga gjalda føroyingar fyri tænastur í Danmark - við donskum blokki.



Handa familjusøgan í endanum á greinini hevur onki við málið at gera. Eg veit so mikið um arbeiðsbýtið í landsstýrinum, at tað eru ikki landsstýrismenn, sum eginhendugt sita og gjalda rokningar. So handa forðingin hjá Oddvør í 1995 stavar frá umsitingarligum slendrian. Og slíkt ger meg ikki júst tryggari við loysingina. Og heldur onkur, at hann kann leggjast inn á hospital í USA, ella hvar fullveldið ætlar at senda sínar sjúklingar, og gjalda aftaná, so fer hann grúsommiliga skeivur.

Tað er mín fasta sannføring, at Høgni Hoydal er ein fantastur, sum í ringasta føri kann forkoma okkara samfelagi. Hetta havi eg skyldu sum javnaðarmaður at berjast ímóti. Og hví skuldi alt Føroya fólk blivið loysingarfólk, fyri tað um hasin ævintýrarin trein inn á pallin?

Eg vóni sanniliga ikki, at ta snævurskygni og inntoleransa, sum Oddvør, Steinbjørn og Árni geva til kennar eru representativ fyri teirra stætt. Ikki at kunna góðtaka og ikki skilja at onnur hava eina aðra áskoðan er rætt og slætt stupiditetur. So er tað sagt.

**Dan R. Petersen**
**javnaðamaður**

# Fólkaræði og verjumál

Fólkaræði merkir, at eitt fólk fær innlit í og tekur støðu til allar týdningarmiklar avgerðir í sínum samfelag. Eisini um hernaðar- og verjumál. Vit hava ikki veruligt fólkaræði í Føroyum - enn.

Tí kundu Føroyar og føroyingar brúkast sum týdningarmikil finna í kalda krígnum og herstøðir leggjast her, uttan at føroyska fólkið fekk nakað innlit ella slapp at taka støðu.

Tí kundi danska stjórnin leggja líka í, at Føroya Løgting umboðandi Føroya fólk einmælt mótmælti hesum. Tí kann danska stjórnin í dag bera rangar upplýsingar og nokta Føroya Landsstýri at fáa okkara møguleikar fram á borðið.

Tí kunnu føroyskir andstøðupolitikarar, uttan nakra sum helst ábyrgd, bera rangar upplýsingar, stuðla stjórnini og gera gjøldur burtur úr teimum, sum hava stríðst fyri veruligum fólkaræði í tí sinnissjúka kalda krígnum.

### Ósannindi prógvað

Vit hava í dag fingið fleiri frágreiðingar, sum prógva allar teir varhugar og spurningar, sum vórðu settir í mótmælunum móti NATO-støðini. Í Grønlandi er sama søga prógvað í ólukkumát. Hartil er prógvað, at føroyskir løgmenn góðtóku at vera meira loyalir mótvegis donsku stjórnini enn móti løgtinginum og tí fólki, sum hevði valt teir.

Vit hava nú fingið prógv fyri, at somu ósannindi og rangir upplýsingar verða førd fram í ár 2000.

Kortini síggja vit føroyskar andstøðuleiðarar og oddagreinar í okkara størstu bløðum, sum skíra landsstýrið at vera ódemokratiskt og leggja persónar og flokkar undir at leypa frá samtyktum.

Tá er talan um serliga grova villeiðing, sum ikki sømir seg einum framkomnum samfelag.

### Ein fólkaræðislig avgerð

Tær einmæltu tingsamtykir, ið eru gjørdar undir heimastýrinum, vórðu rættar og eru sjálvsagt galdandi til ein nýggj rættarstøða og ein fólkaræðislig avgerð er tikin.



Heimurin er broyttur, og tað snýr seg nú um at fáa samstarv á hernaðarøkinum millum tey gomlu stórveldini og at forða fyri nýggjari dubbing og køldum kríggi. Hetta kann eitt nú gerast gjøgnum skipanina Partnership for Peace, har flestu londini, ið fyrr lógu handan jarntjaldið, eru limir.

Einar sjálvstøðugar Føroyar mugu taka ábyrgd og avgerð um okkara verjupolitisku viðurskiftir. Einar ósjálvstøðugar Føroyar kunnu slettis ikki verða limir í nøkrum felagsskapi ella taka nakra avgerð, tí tað er einvíst eitt danskt mál.

### Fólkaræði ella sjónleikur

Tí mugu vit tosa við okkara grannalond og við NATO um okkara støðu í verjupolitikki. Síðani má Føroya Løgting og Føroya fólk taka støðu til, hvørjar avtalur vit gera.

Til tess er neyðugt at fáa allar upplýsingar fram og leggja málið til fólkaræðisliga viðgerð. Hetta fyrireikingararbeiðið er langt síðani farið í gongd og er væl og virðiliga kunnað til uttanlandsnevndina í Løgtinginum og viðgjørt á Løgtingi.

Tað er fólkaræði. Tað er virðing fyri løgtingi og fólkaræðinum. Tað er erligt.

Tann sjónleikur, vit aftur nú hava sæð í hernaðarmálinum, snýr seg tíverri bert um at skýggja sannleikan.

**Høgni Hoydal**

# Er Skálatrøð vorðin friðhalgað?

Summarið er við at halla, býurin verður ruddaður og er reinur og nosligur, grasvallir verða slignir, ikki eiti á, við »gamla kirkjugarð«, trýkanturin, tey kalla, verður sligin og bedini verða lúkað o.s.fr.

Men, men, Skálatrøð stendur við sviðusoð, grasið grør yvir ta rás, sum er gjørd har. Tá tað regnar, kanst tú ikki ganga turrskøddur eftir hesi rás. Hvørt ár mást tú BIÐJA um at fáa tað sligið, og við tógvið stríð koma teir at sláa, tað sum skuldi verið ein sjálvsøgd uppgáva hjá Tórshavnar Býráð, og sum eisini er kommunal ogn.

Trøini standa í hyljum, tá ið tað regnar, tí einki fránensl er av nøkrum slag, so at røturnar rotna, hesi søguligu trø, sum M. C. Restorff innflutti úr Noregi og plantaði, fjálgast skuldi eisini um økið, beinkir setast upp o.t., men einki er hent enn, hóast fleiri ár eru síðan hetta varð sagt.

Við hesum vóni eg, at nakað fer at henda.

**Tórshavn 18. sept. 2000**
**Stig Andrias Restorff**

# Vistfrøðílig framleiðsla

*Føroyingar gera framstig innan vistfrøðiliga framleiðslu*

Leiðandi fyritøkur og stovnar innan matvøruframleiðslu og landbúnað hava tikið stig til at kanna, hvørjir møguleikar eru í vistfrøðiligum framleiðsluháttum og hvørjar fyrimunir føroyski brúkarin og framleiðarin kunnu fáa burtur úr hesum. Við peningaligum stuðli frá NORA er samband knýtt ímillum Føroyar, Ísland og Grønland. Tað er váttanarstovnurin TÚN í Íslandi, sum er verkætlanarleiðari.

Vistfrøðilig framleiðsla er í stórari øking í Europa.

Eisini føroyingar brúka vistfrøðiligar vørur, og eftirspurningurin er vaksandi. Eingin framleiðari ella fyritøka í Føroyum er vistfrøðiliga góðkend, tessvegna er neyðugt at innflyta slíkar vørur. Tað er í hesum sambandi, at MBM hevur sæð møguleikar fyri at kveikja áhuga í millum framleiðarar og gera tað møguligt fyri brúkaran í framtíðini at fáa føroyskar vistfrøðiligar vørur til keyps.



**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini
Ítróttasosialin
á alnetinum
www.sosialurin.fo

# Landsli›sspælarar fáa onga dystarvenjing í tríggjar vikur

*Føroysku landsli›sspælararnir í Íslandi eru harmir um broytingina í FSF reglunum, sum feløgini samtyktu á a›alfundinum í februar*



*Sámal Joensen er harmur um, at útisetarnir í Íslandi ikki fáa dystarvenjing upp undir komandi landsdystirnar*

Íslendska landskappingin enda›i leygardagin, og harvi› hava føroysku spælararnir í bestu deildini í Íslandi ongan møguleika at fáa dystarvenjing, á›renn teir leygardagin 7. oktober og mikudagin 11. oktober skulu spæla landsdystir í ávikavíst Sveis og Jugoslavia.

– Hetta er ein sera ke›ilig stø›a. Vit kunnu renna, og ivaleyst fáa vit eisini høvi at venja í feløgunum í Føroyum, men vit hava ikki møguleika at spæla dystir. Ta› vil siga, at dystarvenjingin ver›ur ikki í topp, tá landsli›i› fer av landinum til hesar bá›ar stórdystirnar.

Hetta sigur Sámal Joensen, sum kom til Føroya í vetrarfrí í gjár. Li›felagarnir hjá honum í Leiftri, Jens Martin Knudsen og John Petersen, eru í somu stø›u sum Sámal Joensen.

Uni Arge er eitt sindur ø›rvísi fyri. Hann er framvegis í Íslandi, har felagi› hjá honum, ÍA á Akranesi, fyrireikar seg til steypafinaluna, sum ver›ur sunnudagin á Laugardalsvøllinum í Reykjavík ímóti ÍBV úr Vestmannaoyggjunum.
Høvi› hjá Una at spæla íslendska steypafinalu ger, at tí›in, sum hann ikki fær høvi til dystarvenjing undan landsli›sfer›ini til Sveis og Jugoslavia, ver›ur tvær vikur.

– Eg veit ikki enn, hvussu ta› ver›ur komandi ár. Um somu spælararnir halda fram í Íslandi, sum hava veri› her í ár, og um vit framvegis ver›a á landsli›num, so ver›a ta› fimm landsli›sspælarar, sum um eitt ár fara at vera í somu stø›u, sum vit eru í nú, vísir Sámal Joensen á.

Leifturs ma›urin hugsar umframt um seg sjálvan og li›felagarnar Jens Martin Knudsen og John Petersen eisini um Una Arge og um Pól Thorsteinsson. Hesin sí›sti ver›ur eftir landsdystirnar í Sveis og Jugoslavia leysur av leikbanninum, sum UEFA gav honum eftir landsdystin í Kekkia fyri einum ári sí›ani. Eftir dystin ímóti Danmark fyri einum gó›um mána› sí›ani gav Allan Simonsen til kennar, at hann avgjørt ætlar at lima Pól Thorsteinsson aftur í landsli›shópin.

### FSF seg›i nei

Sámal Joensen hev›i veri› áhuga›ur at spælt tvey tey sí›stu umførini í føroysku kappingini, og GÍ hevur veri› áhuga› at brúka mi›vallaran. Gøtumenn royndu í juli at skipa so fyri, at Sámal kundi spæla vi› teimum, tá íslendska kappingin var li›ug, men ta› gekk ikki.

Í ásetingunum hjá FSF, sum vór›u samtyktar á sí›sta a›alfundi, og sum ta› ver›ur víst til í hesum sambandinum, ver›ur sagt, at “Føroyskur avtaluleikari uttanlands kann bert fáa loyvisbræv til at leika í Føroyum, um umsókn um hetta ver›ur latin kappingarnevndini í seinasta lagi› 28. juli í kappingarárinum. Vi› umsóknini skal fyriliggj skrivlig váttan frá avtaluleikaranum og felagnum, hann er avtalubundin vi›, um ætla›u flytingina”.

GÍ sendi undan 28. juli skrivliga váttan frá Sámali Joensen og Leiftri um, at ta› var vi› teirra samtykki, at GÍ ba› um loyvi at brúka Sámal eftir at íslendska kappingin var li›ug. Men kappingarnevndin svara›i, at ásetingin skuldi skiljast solei›is, at flytingin skuldi vera beinanvegin eftir 28. juli. Hetta var ta›, sum var umrøtt og samtykt á a›alfundinum, og sjálvt um hetta ikki beinlei›is sæst í or›ingini, so hevur kappingarnevndin valt at tulka or›ingina, solei›is sum ta› var› ætla› vi› n‡ggju ásetingini.

– Vit í Íslandi halda, at hetta er ein trupulleiki fyri okkum og eisini fyri landsli›i›. Ta› eru tveir mátar at loysa trupulleikan uppá. Annar er, at eingir landsdystir ver›a lagdir seinni enn í september. Tí er FSF og føroyskur fótbóltur ikki harri yvir. Hin mátin er at geva okkum loyvi at spæla sí›stu umførini í Føroyum. Ta avger›ina eiga føroysku fótbóltsfeløgini einsamøll. Ta› eru jú tey, sum mynda Fótbóltssambandi›, heldur Sámal Joensen.

Er eingin møguleiki fyri, at tit kunnu fara a›ra sta›ni at spæla aftaná at íslendska kappingin er li›ug?

– Ta› gera fleiri íslendingar, og vit hava eisini dømi um, at føroyskir spælarar hava veri› í feløgum a›ra sta›ni. Men ta› er ikki sum at siga ta›, og ta› hev›i ivaleyst kenst undarligt, um vit rokna›u vi›, at útlendsk feløg skuldu givi› okkum kjans, tá føroyska landskappingin ikki vil vita av okkum. Men í Sveis og Jugoslavia fara øll at vóna og rokna vi›, at vit vera væl fyri, sigur Sámal Joensen, sum komandi vikurnar fer at venja vi› GÍ og sum fer at hyggja at, tá teir sunnudagin fara at spæla á heimavølli ímóti FS Vágum og annan leygardag fara á Svangaskar›.

**JH**

# Byrgja uppfyri avlagandi kapping

*Ta› var eftir ynski frá feløgunum, at FSF leg›i uppskoti› um at avmarka møguleikarnar í føroysku landskappingini hjá føroysku avtaluleikarunum uttanlands*

Uppskoti› um at avmarka møguleikarnar í føroysku landskappingini hjá føroyskum avtaluleikarum uttanlands var grunda› á ta›, sum kom fram, tá Fótbóltssambandi› og feløgini í november í fjør hildu fund fyri at eftirmeta farna kappingarári›.

Hetta sigur Ísak Mikladal, a›alskrivari í FSF.

– Nevndin í FSF samtykti at leggja eitt uppskot um hetta fyri a›alfundin, og feløgini samtyktu uppskoti›. Ta› var› ikki mett at ver›a rætt, at fótbóltsútisetar broyttu fyritreytirnar hjá feløgunum so seint í kappingini. Ta› var› nevnt, at hetta kendist kappingaravlagandi, sigur Ísak Mikladal.

A›alskrivarin í FSF sigur, at n‡ggja avmarkingin líkist nógv henni, sum danir hava, tá ta› ræ›ur um norskar spælarar:

– Í Danmark er ein regla komin um hetta. Danska kappingin endar seinni enn norska kappingin, og ta› ver›ur mett, at ta› hev›i veri› óheppi›, um fleiri spælarar frá t. d. Rosenborg høvdu hjálpt einum donskum felag sí›stu umførini undan vetrarste›ginum og fyrstu umførini eftir vetrarste›gin, á›renn ta› aftur ver›ur fari› undir landskappingina í Noreg.

Ísak Mikladal kennist væl vi› royndina hjá GÍ at tryggja Sámali Joensen loyvi at spæla vi› GÍ í tveimum teimum sí›stu umførunum.

– Vit søgdu teimum, at talan skuldi vera um eitt aktuelt mál solei›is at skilja, at flytingin skuldi vera í mesta lagi› einar tíggju dagar eftir 28. juli. Vit søgdu í skrivinum, at teir vóru vælkomnir at kæra okkara avger› til dómsnevndina, men ta› hevur GÍ ikki gjørt.

**JH**